# Ov høgar vónir til Húskallar

**Húskallar livdu ikki upp til vónirnar, ið ivaleyst vóru settar eitt sindur ov høgt. Kult bólkurin megnaði ikki at vera áhugaverdur longur enn stuttar løtur í senn**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Sum ummælari sleppur tú onkuntíð at ummæla okkurt, ið tú veruliga gleðir teg til. Hetta kann vera torført, tí um tú hevur serligan forkærleika fyri onkrum, kann vera trupult at lurta og hyggja við einum opnum sinni. Tá eg stóð á Vágsbøi í sirmi og sá Húskallar koma á pallin, var eg veruliga spentur. Hetta fór uttan iva at vera ein heilt serlig konsert og møguliga eisini tann einasta, eg nakrantíð fór at uppliva við hesum Føroya størsta kult bólki.

### Ein garrvillur gekkur

Meðan ljóðið av eini stórslignari intro, ið millum annað blandaði ymisk løg av bandinum hjá Húskallum í eina ljóðkolagu, buldraði í hátalarunum, komu húskallarnir inn. Teir vóru ílætnir myrkamorreyðar troyggjur, keppar og føroyskar húgvur. Hjarta í mær sló skjótari, tá teir byrjaðu at spæla, knappiliga fór lagið yvir í Gekka sangin, og Gekkurin sjálvur garrvillur kom hoppandi inn í sínum knarvkoti, syngjandi eyðkenda eyðkennislagið hjá Gekkinum: bimm-diddi-rimm-dimm-dimm. Hetta var so øgiliga beinrakið, og so øgiliga óvæntað, at eg og øll hini á Vágsbøi góvu okkum yvir og flentu hjartaliga.

### Hetta var herligt

Hetta boðaði frá góðum. Tá Jákup Alberg nú kom hoppandi inn á pallin í gummiskón, hálvhosum og føroyskari húgvu við eini banjo í hondini og byrjaði at syngja um Hans Ansgar, kundi eg ikki annað enn rópa av ovfarakæti - Hetta var herligt.

Ein svøk framførsla, ið ivaleyst bert fór at vaksa uppaftur svakari. Men nei, longu tá sangurin um Hans Ansgar var liðugur, var eg farin at troyttast av sanginum hjá Jákup Alberg.

### Longdist eftir Kaj

Sum gamal fjeppari eri eg greiður yvir, at Jákup Alberg á ongan hátt kann metast sum ein upplagdur sangari. Hann syngur nasalt og ja, beinleiðis illa. Hetta er ein partur av sjarmuni og riggar onkursvegna á bandinum Hjá Húskallum. Men á konsert á Vágsbøi í sirmi og snýkjandi náttarkulda var sjarman eitt sindur torført at finna, og tá Jákup Alberg hevði sungið fleiri onnur løg, var eg farin at leingjast illa eftir hinum sangaranum, Kaj. Tá Kaj endiliga kom aftur á pallin, hesaferð uttan gekkaskort og kot, vaks vónin aftur. Kaj, ið vanliga er ein góður sangari, saman við hesum stóra úrvalsbólki av tónlistarligum úrmælingum - Tað kundi næstan bara verða gott. Men ak, aftur skuffaður. Kaj orkaði als ikki at syngja, og tann vanliga so góða røddin var ein skuggi av sær sjálvari. Tað tók fleiri løg, áðrenn Kaj fekk skil á røddina, og upphitaður kundi syngja" Bóndin hungrar" og "Ria" til stóra frægd fyri áskoðararnar. Hesi løg riggaðu væl, men vóru ikki nóg mikið at bjarga heildarupplivingini.

### Lokkaðir at luttaka?

Ein søga gongur um upptøkurnar av Húskalla bandinum, at Kaj, Jákup Alberg, Jón og hinir húskallarnir væl vistu, at hetta bandið var nakað heilt serligt, ið lætt kundi gerast nakað, ið teirra vinir í føroyska tónleikalívinum fóru at halda hánt um. Tí lokkaðu teir flesta allar etableraðar tónleikarar at spæla ein part av eini solo á einum lagi. Hetta soleiðis, at teir við síni luttøku, ikki á sama hátt kundu finnast at bandinum.

Eg veit ikki, um tað er sama prinsipp, ið er brúkt tá bólkurin skuldi setast saman til Summarfestivalin, ella um allir teir bestu føroysku tónleikarnir hava staðið í bíðiröð fyri at sleppa við. Men tann 12 manna stóri bólkurin telur nakrar av okkara allar bestu tónleikarum. Tí var tað eitt sindur skuffandi, at bólkurin ikki fekk gjørt eina meira áhugaverda ljóðmynd. Hetta ljóðaði mest sum ein tunað útgáva av Taxi, og tað klæddi ikki Húskalla løgunum og vokalunum betur enn næstbest.



*Jákup Alberg hevur eina av mest sermerktu røddunum í føroyskum tónleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Eager To Please eru ein av Føroya best samanspældu bólkum*

# Einki roks frá Eager To Please

**Eager To Please borðreiddi við einum massivum veggi av ljóði, tá bólkurin fylti Flagsteltið við sínum harða rokki**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Eftir at Smokie vóru lidnir at spæla, áttu Eager To Please heiðurin at taka um endan. Nógv fólk fór beina leið til hús, tí farið var um miðnátt, so teltið var minnið enn hálv fult, meðan Eager To Please spældi. Hetta tóktist ikki at merkja bólkin, ið var serstakliga væl upplagdur. Ljóðmyndin var somikið ógvislig, at teltið var fylt á tremur av henni. Fyri einaferð skuld ljóðaði tað væl í hesum ofta so svikaliga telti.

### Rokkur uttan hóvasták

Tónleikurin var ein long røð av teirra egnu løgum, ið eru at finna á teirra fyrstu fløgu, sum kom í handlarnar fyrr í summar, umframt okkurt, ið teir ikki hava givið út enn. Hetta er rokkur uttan so nógv hóvasták við rót í rokkinum í sjeyti- og áttatiárunum. Rokkur, ið klæðir væl at verða spældur live, og hetta megnaðu Eager To Please til fulnar.

### Ein frægd at hoyra

Botnurin koyrdi sum ein damptrumla undir gittarum, ið eisini vóru sera væl spældir og væl hjálpt av góðum ljóðarbeiði gav hetta løgunum optimalar umstøður. Tað var ein sonn frægd at hoyra teir tríggjar gittarleikararnar spæla saman og hvør sær geva ljóðmyndini nakað eyka. Oyrini vóru forkelaði av tveimum sologittarum, ið dittaðu sær at spæla okkurt, sum best kann lýsast sum ein dupult solo (ummælarin er greiður yvir ansøgnina í hesum hugtaki)

### Melodiirnir telja niður

Løgini hava tó nakrar veikleikar, sum forðaðu konsertini veruliga at fáa luft undir veingirnar. Hetta er øgiliga klassiskur lættisoppakendur hard rokkur, sum vit kenna hann frá hópin av bólkum. Hetta setir sjálvandi stór krøv til kompositiónirnar, ið lætt kunnu enda sum vánalig avrit av øðrum løgum. Á melodi síðuni megnar Eager To Please ikki at liva upp til hesi krøv. Melodiirnir eru ikki nóg fangandi, til at tú fellur fyri teimum, men nóg banalir til, at tú troyttast skjótt av teimum,. Hetta er synd fyri ein so væl spælandi bólk, ið antin átti at fingið sær hjálp við lagskrivingini ella bara dyrka tað at spæla lániløg og geva teimum ein Eager To Please dám.

Sangarin Dagfinn Joensen syngur væl, og røddin er heilt góð. Tó uttan at vera nóg serlig, nóg vøkur ella nóg áhugaverd til at klára at geva teimum heldur veiku melodiunum tað eyka, ið kundi lyft teir eitt sindur. Teir klisje mettaðu tekstirnir standa tí so øgiliga týðiligir í síni væntandi dygd. Tað kundi verið áhugavert at hoyrt bólkin sungið á føroyskum. Hetta hevði givið teimum eina áhugaverda dimensión.